# Endurtekur søgan seg?

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Ófatiligt, at trý fólk við autismu verða blakað út við minni enn 3. mánaða fráboðan úr heimi sínum. Tey skulu flyta, uttan at tey ella teirra avvarðandi eru spurd ella hoyrd. Harumframt skulu tey flytast saman við fólkum, sum tey valla fara at hóska væl saman við.

**Fjølbroytni**

Sigur Sosialurin satt, so skulu tríggir menn við Asperger syndromi flyta saman við nøkrum fólkum, ið eru evnaveik. Øll menniskju eru ymisk – hava ymiskan tørv og førleikar. Fólk við Asperger hava síni eyðkenni. Avvarðandi, ið svarar Sosialinum orðar seg soleiðis: "teimum dáma best at vera fyri seg sjálvi og vilja helst sleppa undan sambandi við onnur." Hesir tríggir menninir hava nú havt sítt heim í Pætursgøtu, har teir hava trivist væl. Meðan fleiri sambýli eru meiri og minni vánaligar lappaloysnir - tí talan mangan er um sethús sum eru óegnað sum sambýlið - riggar Pætursgøta, sum skilst væl. Havi skilt, at eitt av búfólkunum bæði hevur búð í Danmark, psykiatrisku deild, Eirargarði og seinastu 9 árini í Pætursgøtu. Í Pæturgøtu hevur hann trivist og lívsdygdin verið góð.

Ikki øll hava roynt at missa sítt heim, men tey flestu kunnu ímynda sær, at tað er nakað ræðuligt. Nógvar kanningar eru gjørdar um, hvørjar avleiðingarnar kunnu verða fyri frísk børn, ið verða flutt – væl at merkja saman við foreldrunum. Tey kunnu koma í kreppu. Hvørjar tankar hava tey, ið hava tikið hesa avgerð, gjørt sær um fylgjurnar fyri hesar tríggjar menn, sum hava Asperger syndrom?

**Tey sum eru evnaveik**

Tey sum eru evnaveik eru eisini ymisk, men eitt - sum eyðkennir fleiri teirra er - at teimum dámar sera væl at práta og koma í samband við og samskifta við onnur. Við øðrum orðum – hóast ymiskleiki mangan er góður – tykist matchið ella tað at fólk sum eru evnaveik og fólk við aspergersyndromi skulu búleika saman ikki at vera serliga vælumhugsað. Vit mugu spyrja, hví er hetta hugskotið vorðið veruleiki? Er hetta ikki til ampa fyri báðar hesar bólkar av brúkarum? Og eru tey sm eru evnaveik spurd? Sum skilst eru búfólkini í Pætursgøtu ikki spurd.

**Flash back til "fyrr í tíðini"**

Havi sum barn hoyrt nógv um søguna hjá teim evnaveiku, ið vóru landsforvíst úr Føroyum. Serliga minnist eg eina søgu, sum allarhelst eisini stendur í frálíku bókini hjá Doris Hansen: Søgan um hini. Søgan er um eina kvinnu sum fyri hálvthundrað árum síðani varð send á Rødbygaard. Rødbygaard var ein ovurstórur stovnur fyri fólk við menningartarni, har búðu um 90 føroyingar. Kvinnan var har í mong ár, og tað var hildið at vera einki minni enn ein skandala. Kvinnan, sum onki segði - hon skilti ikki danskt - hevði allarhelst autismu.

Tað er ikki til at bera, um tað almenna skal ganga á odda við at reka tey, ið minst tola tað á dyr. Tey eru púra ósek í tí, ið sigst at vera orsøkin til hesa avgerð. Í mínum hugaheimi er hetta eitt brotsverk. Minnist eina eldri bygdakonu, stutt áðrenn hon doyði, siga, "at nú tori eg at doyggja, tí nú hevur barn mítt, sum búði so mong ár á Rødbygaard, fingið eitt veruligt heim í Føroyum. "

**Sparingar!!**

Skal orðið sparingar nú áhaldandi nýtast sum undanførsla og grundgeving fyri fleiri vitleysum gerðum? Nei, higartil tykist mær, at tað bert er á almannaøkinum og mentanarøkinum at orðið sparingar verður nýtt hjá samgonguni. Dagtilhald, heiligvágur, børn við serligum tørvi, almannastovan, setrið, fólkaskúlin og nú hetta! Hvussu leingi er ætlanin at halda áfram eftir hesum leisti? Nær skulu hini landsstýrismenninir bretta uppum armar og spara? Haldi, hetta sigur ein hóp um hugburðin hjá sitandi samgongu,

Landsstýriskvinnan Rósa Samuelsen var í samband við sparingar á fíggjarlógini fyri 2009 fleiri ferðir endurgivin fyri at siga, at peningurin mátti brúkast betur. Ivist ikki í, at henda virðiliga kvinna meinar tað hon sigur. Men, heldur samgongan og landsstýriskvinnan, at hetta er at brúka peningin við skynsemi?

# Bjarni, Bjarni meinar tú tað

JÓGVAN VIÐ KELDU



Umráðandi er at lata tað sum virkar fáa frið at virka og at útbyggja tað.

Fyri nøkrum døgum síðani, var onkur so "lættsintur" at seta í umfar, at almenna reiðaríðið skuldi flytast, sum tað var, til Suðuroyar.

Skikkiliga skjótt reistist mín góði gløggi partamaður, Bjarni Djurnholm, og mótmælti enntá við fyrispurningi, og segði, at "hann skilti ikki orsøkina til, at nakað sum virkaði, skuldi flytast"!

Tíðin hjá mær er farin har eg kundi hava part í avgerð, hvar nakað skal liggja, so tað fari eg at "lata liggja", men lat meg siga, at umráðandi er, at tað sum virkar eigur at hava frið, og at tað eigur at verða útbygt.

**Skotriðurnar móti Klaksvíkar Sjúkrahúsi**

Men at júst Bjarni sigur hetta, skilji eg ikki. Her er hann inkonsekventur. Er nakað Bjarni og flestu tingmenn í Suðurstreymi hava lagt orku í, so er at fáa niðurlagt og oyðilagt best virkandi sjúkrahúsið í Føroyum seinastu 40 árini, fyri at flyta viðgerðirnar á Landssjúkrahúsið, sum altíð hevur verið í trupulleikum.

Umframt, hava skotriðurnar øll árini duna frá leiðslu, læknum og so embætisfólkum Landssjúkrahússins móti Klaksvíkar Sjúkrahúsi, samstundis hava hesi roynt at billa politikarum inn, at eingin meining er í at hava "smá" sjúkrahús. Tað kann undra, at tað hevur hildið til tílíkan ágang, ikki bara tað, men er komið styrkt úr slagnum!

Hesi hava veruliga fingið billa politikarum inn, at vit 40.000 íbúgvar, hava møguleika at hava eitt "stórsjúkrahús" og at tað verða bara tey "stóru sjúkrahúsini" í ríkinum, sum koma at yvirliva, hava fingið fólk at trúgva, at Landssjúkrahúsið er og verður eitt av "hesum stóru sjúkrahúsunum" í ríkinum. – Ja, ikki er tað serliga eyðmjúkt!

Øll árini eg havi verið í politikki, og verið tætt upp at sjúkrahúsverkinum, sum stýrislimur, komi eg altíð, tá eg hugsi um Landssjúkrahúsið, í tankar um fyribrigdið "læknar uttan landamark".

Sjálvur eri eg ræddur fyri, og fari at endurtaka tað, at kanska er ein orsøk til, at læknar hava ilt við at koma til Føroya er, at hesir kveppa seg við at søkja inn í "krígsherjað" øki, sum "stórsjúkrahúsið" hevur verið.

**Óveruligt "stórsjúkrahús"**

Hvussu hongur tað saman, at ikki stendur á, hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi – sambært Jákup Petersen, yvirlækna, í Dimmalætting – at fáa læknar til lítla, men vælvirkandi sjúkrahúsið við góðum disciplini og sjálvdiciplini, við trivnað, nøgdsemi og høgum tænastustøði, meðan vit so ofta í okkara fjølmiðlum fáa at vita, at sjúkrahúsið, sum fer við næstan allari játtanini til heilsumál í sama mun livir undir tvørrandi trivna.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, takk fyri, at tú hevur sett arbeiðsbólk at leggja til rættis útbygging av Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Gangi út frá, at Bjarni Djurholm og onnur tingfólk í Suðurstreymi skorða undir eina so áhugaverda verkætlan við stovni, sum liggur og virkar væl, og sum tænir øllum Føroya fólki.

Og til seinast! Haldið uppat at billa fólki inn, nakað so óveruligt, sum at Landssjúkrahúsið nakrantíð fer at gerast, tað vit vanliga kalla eitt "stórt og vælvirkandi stórsjúkrahús", sum skal hava fólkagrundarlag við hálvari ella heilari millión!

Eg endurtaki spurningin: "Bjarni, Bjarni, hví so inkonsekventur".

# Eiga at prístalsregulera blokkin

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



**Eg skilji ikki teir politikarar, sum av berum stoltleika og nationalismu, ikki vilja tosa um at prístalsregulera blokkin, nú vit hvønn dag síggja, at játtanirnar til millum annað gomul og sjúk, mugu skerast inn á bein**

Dagtilhald lata aftur. Ungar gentur verða ikki koppsettar fyri lívmóðurhálskrabba. Pensjónistar missa stuðul til heilivág. Árliga pensjónshækkingin lækkar. Óhjálpin liggja heima, tí pláss er ikki fyri teimum á stovnum o.s.fr. Hetta eru Føroyar í 2009.

Alt hetta kunnu vit fáa uppá pláss við eini einstakari samtykt. Um vit samtykkja at prístalsregulera blokkin aftur, og oyramerkja pengarnar til hesi og onnur átrokandi øki, so eru trupulleikarnir loystir.

Einasta forðingin er nationalistiskur stoltleiki. Politikarar vilja ikki viðganga, at vit hava brúk fyri hesum pengunum. Vit skulu "seta føtur undir egið borð", "ráða í egnum landi", o.s.fr., og so mugu gomul og óhjálpin liggja sum tey liggja.

Hvussu leingi kunnu vit lata hetta sosiala óskilið standa við av berum nationalistiskum fjanti?

Eg skal fegin vera tann fyrsti at játta mín stuðul til at prístalsregulera blokkin aftur, og lata øktu inntøkuna fara til nevndu øki.

# Viðmerking frá KODA quislingunum

ATLI K PETERSEN OG KÁRI BÆK

Við tað at okkara heilar ikki eru liðugt útviklaðir (sambært Petur Jacobsen, (PJ) í Sosialinum), ber hendan viðmerkingin helst brá av ófullkomni. Lesarar verða at halda okkum til góðar.

Vit skulu enn einaferð gera vart við, at so leingi vit ikki hava eina dagførda upphavsrættslóg, verður galdandi mannagongd, har KODA umsitir upphavsrættin vegna føroysku tónaskøldinni, ikki broytt.

Hasar fínu útrokningarnar hjá PJ skulu sendast til KODA. Vit hava sum so ongar viðmerkingar til, hvussu væl PJ dugir at rokna.

Tað er vakurt gjørt av PJ, at gera vart við, hvussu nógv vit snýta okkum sjálvi, men tað er meira áhugavert, hvussu hann fer fram mótvegis føroysku tónaskøldunum og felagi okkara. Serliga er tað hansara høvisligi málburður, har PJ ferð eftir ferð sýnir virðing fyri okkum sum stætt og vísir í verki, hvussu áhugaður hann í veruleikanum er í at fáa í lag samskifti millum føroysku rásirnar aðrumegin og føroysku tónaskøldini hinumegin.

Við hasi framferðini vænta vit eitt sera fruktargott samstarv í framtíðini.

Forrestin, hvørja rás umboðar PJ?

Hetta er okkara seinasta viðmerking í hesum máli.